# ítróttur

Nr. 98 • mikudagur • 26. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Kári Nielsen í hitanum

**HB-miðvallarin fekk mánadagin boð um, at hann nú eisini er í landsliðshitanum**



*Kári Nielsen er triði HB-leikarin, sum er tikin út í landsliðshópin til dystin móti Hollandi*

Eftir at íslendsku útisetarnir longu hava givið avboð, kom túrurin í gjár til ein av teimum, sum dagliga spæla í Danmark.

Nú er tað John Byrial Hansen, sum ikki fær frí til landsdystin móti Hollandi. Felag hansara, Horsens, roynir framvegis at stríðast í dystinum um at vinna uppflyting til bestu donsku røðina, og tá teir hava dyst annan hvítusunnudag, hevur leiðslan í felagnum lítlan hug at geva føroyska verjuleikaranum frí.

Tí hevur enn einaferð verið neyðugt at taka nýggjan mann í hópin. Hesaferð fall valið á HB-miðvallaran, Kára Nielsen, sum við hesum gerst triði HB'arin í hópinum. Rógvi Jacobsen var tikin við í upprunaliga hópin, og eftir avboð frá Hans Fróða Hansen varð eisini Vagnur Mohr Mortensen tikin út.

Samstundis tykist tað vera ein staðfesting, at Símun Eliasen nú er longur burtur frá einum landsliðssessi, enn hann nakrantíð hevur verið.

Í greinum, sum fyri stuttum hava verið í bløðunum, hevur annars verið róð framundir, at Símun átti at verið royndur á landsliðnum, men higartil er hann so ikki boðsendur, og so er ilt at síggja, nær boðini skulu koma. Tveir miðverjar hava longu givið avboð, og hartil er Jón Rói Jacobsen framvegis ikki tøkur eftir sín skaða.

## Leon fór ongan veg

Í farnu viku skrivaðu vit, at Leon Bjartalíð hevði gjørt av skifta felag, og at hann restina av kappingarárinum fór at spæla við ÍF.

Hetta gjørdist tó av ongum. Fríggjadagin høvdu KÍ og Leon fund, og har varð semja gjørd um, at Leon framhaldandi fer at verða partur av KÍ-liðnum.

**-jm**

## Súni Fríði í NSÍ

NSÍ sigur á heimasiðu síni, at felagið hevur gjørt avtalu við Súna Fríða Barbá um at spæla við felagnum restina av kappingarárinum.

Súni Fríði er annars uppvaksin í NSÍ, men í vaksnu røðunum hevur tað fyri tað allarmesta verið á Toftum, at hann hevur gjørt um seg. Eisini hevur hann roynt seg hjá HB, GÍ og so NSÍ, og tað verður so hjá hesum seinasta nevnda, at hann fer at spæla restina av árinum, skilst.

**-jm**

## Føroyingauppgerð

Tey bæði føroysku útisetafeløgini í íslendskum fótbólti, ÍA og Fram fara mikudagin at dystast sínamillum.

Hetta verður fyrsta ferðin í fýra ár, at føroyingauppgerð er í bestu íslendsku fótbóltsdeildini, og so verður spennandi at vita, hvørt tað verða Julian Johnsson og ÍA ella Hans Fróði Hansen /Fróði Benjaminsen og Fram, sum fara av vøllinum sum vinnari.

Eftir tvey umfør er Fram á øðrum plássi í deildini við fýra stigum. ÍF er nummar sjey við tveimum javnleikum higartil.

**-jm**

## Andrew skoraði fýra



Føroyski landsliðsspælarin Andrew av Fløtum var í røttum málhýri, tá ið U21-liðið hjá Fremad Amager mánakvøldið vann 6-4 á Herfølge. Andrew av Fløtum gjørdi ikki færri enn fýra mál, og hann loyvdi sær enntá at misnýta eitt brotsspark. Dysturin var hálvfinala í steypakapping fyri U21 lið og í finaluni skal Fremad Amager spæla ímóti antin Greve ella Avarta.

**-ek**

## Velje-venjarin gavst

Tað hevur gingið sera illa hjá danska felagnum Vejle seinastu tíðina. Um vikuskiftið tapti felagið heili 7-0 á heimavølli og liggur nú á einum niðurflytingarplássi í næstbestu donsku deildini.

Hetta fekk mánadagin venjaran hjá felagnum, Jens Tang Olesen, at siga seg úr starvinum. Jens Tang Olesen hevur arbeitt nógv sum venjarainstruktørur í Føroyum og hevur í nógv við í føroysku venjaraútbúgvingini.

Nýggjur venjari hjá Vejle verður Mogens Nielsen.

**-ek**

## FCK-umstøður ov vánaligar

Ole Tobiasen, sum er liðfelagi hjá Toda Jónsson í FC Keypmannahavn, heldur, at venjngarumstøðurnar í felagnum eru ikki nóg góðar. FCK venur á Peter Bangsvej, har gomlu leikvøllirnir og høllin hjá KB eru, men tað er ikki nóg gott fyri eitt slíkt felag sum FCK, heldur Ole Tobiasen.

Hann hevur áður spælt fyri hollendska stórfelagið Ajax, og har eru umstøður nógv betur, og tað er ein av mununum millum FCK og tey feløgini, sum FCK gjarna vil samanlíknast við.

Leiðslan í FCK hevur fyrr í ár kanna møguleikarnar fyri at venja aðrastaðni, men eingin endalig avgerð er tikin um tað, skrivar heimasíðan onside.dk

**-ek**

## Bland í bygdunum

Í frásøgnini frá kappróðrinum á bygdastevnuni á Skála var bland komið í bygdirnar og bátarnar. Skála er ikki komið afturíaftur sum róðrarbygd. Haraftur-ímóti er Argir framvegis eitt av teimum plássunum, sum er fremst í kappróðri. 5-mannafarið á Skála eitur Svanur, og Blikur hoyrir framvegis heima á Argjum. Vit biðja lesararnar og ikki minst óføru manningarnar á Bliki, sum vit ivaleyst fara at hoyra og síggja nógv meiri til í summar, halda okkum til góða. Vónandi verður venjingarstøðan hjá okkum betri, tá ið fyrsti FM róðurin verður í Klaksvík annan leygardag!

**-blðm.**

## Milton ikki ríkur



Meðan spælararnir og feløgini kappast um stórar millióna upphæddir í finaluni í Champions League fótbóltskappingini, so verður dómarin ikki ríkur av dystinum, hóast uppgávan er nakað av tí størsta í europeiska fótbóltsheiminum.

BT skrivar, at Kim Milton Nielsen fær einar 10.000 krónur fyri at døma dystin mikukvøldið.

Feløgini, sum eru við í Champions League, plaga at lova spælarunum stórur bonusupphæddir, og hevði eitt nú enska felagið Chelsea vunnið kappingini, høvdu spælararnir fingið 6,5 milliónir krónur í part.

**-ek**



# Súkkluhjólini farin at mala aftur

**Í himmalsins óðnarveðri løgdu føroysku súkklararnir til brots aftur. Bygdastevna var á Skála, og er hetta ársins fyrsta súkklukapping**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin stóð fyrsta súkklukapping í ár á skránni. Kappingin gekk fyri seg á Skála í samband við bygdastevnuna, sum var í vikuskiftinum.

Skipað varð fyri kappingum millum børn, unglingar og vaksnum, og sum altíð varð møguleiki hjá bæði gentum og dreingjum at kappast.

Tey vaksnu kappast í einkultstarti, og gekk leiðin frá Skála til Undir Gøtueiði, har vent varð við rundkoyringina, og so aftur á Skála. Teinurin er 25 kilometur langur. Hesin teinurin er royndur fyrr, eisini í samband við eina bygdastevnu á Skála, og er hesin teinur sera væl egnaður til júst hetta slag av súkklukappingum, nevniliga einkultstart.

Tá súkklað verður einkultstart, fara ein og ein avstað við einum minutti millum hvønn súkklara. Eli Christiansen byrjaði næstseinast, og Gunnar Dahl-Olsen seinast. Eli var væl koyrandi, og skjótt megnaði hann at koyra hinar inn aftur. Væl gekk hjá Gunnari eisini, og eisini hann fekk skjótt arbeitt seg meir og meir inn á hinar. Komnir nakað framvið Skálabotn eydnaðist tað Gunnari at koyra Eli inn aftur, og so sá ljóst út hjá Gunnari. Men Eli kempaði og megnaði at halda tørn líka til vent var undir Gøtueiði. Eli byrjaði at troyttast, og munurin øktist tí enn meir millum teir. Tá samanum kom vann Gunnar við góðum trimum minuttum.

Bergur Johansen var eisini væl koyrandi, og eisini hann vann sannførandi á kappingarneytanum, Dánjal Michaelsen.

Í bólki III hjá dreingjum vann favoritturin Torkil Weyhe. Teir vóru seks súkklarar í hesum aldursbólki, men eftirsum at allir ikki koyrdu á kappsúkklu, bleiv bólkurin býttur sundur í tveir, við kappsúkklu og við fjallasúkklu.

Torkil vann sum sagt tryggan sigur, men spenningur var kortini gjøgnum alla kappingina, tí allir fylgdust líka til endaspurturin skuldi traðkast. Og tá var onki ivamál um hvør hevði tey bestu beinini.

Finnur Mellemgaard hevur eins og Torkil klára seg stak væl seinastu árini, og hann hevur við sínum nógvu sigrum víst, at tað lønar seg at venja. Eisini hann koyrdi ein tryggan sigur heim við einum góðum endaspurti.

Kappast var í hesum bólkum hjá bæði dreingjum og gentum:

| | |
|---|---|
| Bólkur I: | 1996 til 1998 |
| Bólkur II: | 1993 til 1995 |
| Bólkur III: | 1990 til 1992 |
| Ungdómur: | 1987 til 1989 |
| Vaksin: | 1986 og eldri |

Næsta kapping verður á Norðoyastevna, og koyrt verður leygardagin 5. juni. Koyrt verður Býarkoyring og mál og startur er við Norðoya Sparikassa. Lýst verður í skránni nær kappingin byrjar.

**Úrslitini frá bygdastevnuni á Skála:**

**Gentur, bólkur I, 1 km:**
**Nr. Navn**
1 Ata Joensen
2 Josefina Prestá

**Gentur, bólkur II, 1,5 km:**
1 Sólbjørg Jacobsen
2 Maria Joensen
3 Jana Joensen
4 Oda M. Johannesen

**Gentur, bólkur III, 2 km:**
1 Paula Johansen
2 Hansa Olsen

**Dreingir, bólkur I, 1 km:**
1 Kristian Johansen
2 Eyðbjørn Eiriksson
3 Kjartan Johansen
4 Poul Enok Hansen
5 Tóri Nielsen
6 Janus Hannesarson

**Dreingir, bólkur II, 2 km:**
1 Finnur Mellemgaard
2 Jens Pauli Johansen
3 Haraldur Johannesen

**Dreingir, bólkur III, 3 km:**
1 Torkil Weyhe
2 Sigmundur Olsson
3 Rúni Bláfoss
4 Rani G. Jacobsen

**Dreingir, bólkur III (fjallasúkklu), 2 km:**
1 Steinar Prestá
2 Paul Eli Johannesen

**Vaksin:**
1 Gunnar Dahl-Olsen 39 min. 20 sek.
2 Eli Christiansen 42.54
3 Geyr Gilsteinsson 1.00.17

**Unglingar:**
1 Bergur Johansen 48.03
2 Dánjal Michaelsen 53.56


# Skúlabarnakoyring

Í sambandi við at broytingar eru gjørdar í bussleiðini tann 22. apríl 2004, er faldari sendur út til øll húski.
Umframt tær leiðir, ið eru lýstar í faldaranum, er møguleiki hjá skúlabørnum o.ø. at nýta hesar farleiðir:

## Kirkjubøar-Velbastaðar leiðin

**Kirkjubøur-Velbastaður-Tórshavn**

| | Mánadag | | | Týsdag | | | Mikudag | | | Hósdag | | | Fríggjadag | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Úr Kirkjubø | 7.25 | 8.10 | 17.40 | 7.25 | 8.10 | 17.40 | 7.25 | 8.10 | 17.40 | 7.25 | 8.10 | 17.40 | 7.25 | 8.10 | 17.40 |
| Av Velbastað | 7.35 | 8.20 | 17.50 | 7.35 | 8.20 | 17.50 | 7.35 | 8.20 | 17.50 | 7.35 | 8.20 | 17.50 | 7.35 | 8.20 | 17.50 |
| Í Tórshavn | 7.45 | 8.30 | 18.00 | 7.45 | 8.30 | 18.00 | 7.45 | 8.30 | 18.00 | 7.45 | 8.30 | 18.00 | 7.45 | 8.30 | 18.00 |

**Velbastaður-Kirkjubøur-Tórshavn**

| | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Av Velbastað | 9.50 | 12.10* | 12.10 | 12.10 | 9.50 | 12.10 |
| Úr Kirkjubø | 10.00 | 12.20* | 12.20 | 12.20 | 10.00 | 12.20 |
| Í Tórshavn | 10.20 | 12.40* | 12.40 | 12.40 | 10.20 | 12.40 |




* Síðsti túrur úr Kirkjubø eftir tilkalling 21 31 61

**Tórshavn-Velbastaður-Kirkjubøur**

| | Mánadag | | | | | Týsdag | | | Mikudag | | | | Hósdag | | | | Fríggjadag | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Úr Tórshavn | 13.45 | 14.35 | 15.30 | 17.15 | 22.15 | 15.00 | 17.15 | 22.15 | 13.20 | 15.30 | 17.15 | 22.15 | 13.45 | 15.30 | 17.15 | 22.15 | 13.45 | 15.30 | 17.15 | 22.15 |
| Á Velbastað | 13.55 | 14.45 | 15.40 | 17.25 | 22.25 | 15.10 | 17.25 | 22.25 | 13.30 | 15.40 | 17.25 | 22.25 | 13.55 | 15.40 | 17.25 | 22.25 | 13.55 | 15.40 | 17.25 | 22.25 |
| Í Kirkjubø | 14.05 | 14.55 | 15.50 | 17.35 | 22.35* | 15.10 | 17.35 | 22.35* | 13.40 | 15.50 | 17.35 | 22.35* | 14.05 | 15.50 | 17.35 | 22.35* | 14.05 | 15.50 | 17.35 | 22.35* |

· Fyrsti túrur um morgunin og báðir kvøldtúrarnir verða koyrdir yrkadagar.
· Allir aðrir túrar eru skúlakoyring. Tað kann koma fyri, at skúlin avlýsir túrar, um tað gerst neyðugt.

**Um kvøldið verður koyrt soleiðis:**
Úr Tórshavn 17.15: Steinatún – Frælsið – Velbastaðvegur – Velbastaður – Kirkjubøur – Velbastaður og aftur til Havnar.
Úr Tórshavn 22.15: Shell við Ringvegin – R.C. Effersøesgøta – Steinatún – Frælsið –Velbastaðvegur – Velbastaður – Kirkjubøur og aftur til Havnar.

## Eyka skúlabarnakoyring til Eysturskúlan

**Berjabrekka-Eysturskúlin**

| | Berjabrekka | millum Gilja | Løgmannabreyt | inni á Gøtu | Eysturskúlin |
|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag-fríggjadag | 7.30 | 7.33 | 7.37 | 7.45 | 7.55 |

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
30 20 10 · www.torshavn.fo



Fire Mermaid

Eldsløkkiútgerð

til smábátar



Skjótt og lætt og við kappingarførum prísum, seta okkara fakfólk upp vælumtóktu eldsløkkiútgerðina Fire Mermaid í smábátar upp til 24m longd.

Til vinnurekandi bátar er krav um at skipanin er sett upp av løggildum fólki. Hesa løggilding hava fakfólk okkara.

Ringið og fáið meir at vita hjá Kristian Martin Jacobsen á tlf. 21 23 86.

STEPHANSSONS HÚS 314291

SKIPASMIÐJAN
Tlf. 301100